# Hvaðani kom seiðurin?

*Í eini av sendingum sínum í Lindini, nevnd "Brot úr lívsins dagbók" hevur Effie Campbell hesa frásøgnina frá eini kvinnu við ættarbondum úr Svínoy:*

Mamma mín er ættað úr Svínoy, so tá ið vit vóru børn, vóru vit ofta har úti og ferðaðust hjá abbasystur okkara, sum var ógift, og sum dag og dagliga livdi í tí andaliga saman við Gudi.

Eitt leygarkvøld, tá ið systir mín var har úti, sigur abbasystir við hana, tá ið tær fara til songar: "Eg veit ikki, hvat ið vit skulu hava til døgurða í morgin".

Tær løgdu seg so. Morgunin eftir, tá ið tær eru uppi, gloppar abbasystirin hurðina at vita, hvussu veðrið mundi vera. Nú liggur ein stór teyggja við nýfiskaðum seiði á trappusteininum.

Seiðurin var ókruvdur, høvdini vóru uppiá, og fiskarnir lógu so vakurt í einum rundingi rundan um hetta bandið, teir vóru bundnir í.

Abbasystirin gjørdist ógvuliga glað; men hon undraðist eitt sindur, tí brim var í báðum støðum í Svínoy henda dagin.

Hon helt, at hon mátti fara at siga teimum takk, sum høvdu givið teimum fiskin. Hon gekk hús úr húsi; men eingin hevði verið til útróðrar, og tískil hevði eingin har givið henni henda fiskin.

*snorri@sosialurin.fo*



## Norðast til sunnast við Oyggjablaðnum




Síðani á vári í fjør hevur Sosialurin havt Oyggjablaðið sum eitt eykablað í hvørjum mikudagsblaði.

Her hava vit vitjað kring oyggjarnar, eins og vit hava tikið upp ávís viðkomandi evni, so sum veiðu, føroyska framleiðslu, bilar, fiskivinnu oeweg bøkur.

Í Oyggjablaðnum eru vit nú í gongd við eina nýggja rundferð kring oyggjarnar, sum í stóran mun fylgir 7. breiddarstigi á heimsatlasinum.

Vit hava valt at kalla rundferðina "Føroyar - norðast til sunnast". Ætlanin er so líðandi, men tó ikki slaviskt - at vitja flestu bygdir og oyggjar, ið liggja nærhendis hesum ása hetta komandi árið.

Góðan lesihug.

*snorri@sosialurin.fo*

# Tyrlupallur til ferðafólkið

Hesa seinastu tíðina hava menn arbeitt við at betra um umstøðurnar hjá teimum, ið velja at ferðast til Svínoyar við tyrlu.

Í nánd av tyrlupallinum er eitt hús sett upp, og nú verður arbeitt við at innrætta tað til móttøkuna av ferðafólkum.

Innan skal gerast eitt bíðirúm, skrivstova og toilett.

*snorri@sosialurin.fo*




***Umframt møguleikan at ferðast sjóvegis, hava tey ferðandi eisini møguleika at koma til og frá Svínoy við tyrluni hjá Atlantsflogi***

*Mynd: Jens Kristian Vang*